Kappingarárið 2021

26. september




Dagsins dystarbólt letur:

# Árni Jacobsen

Leikskrá nr. 14

## 07 Vestur

**Stovnað:** 6. novembur 2007

**Heimavallir:**
Dungasandur í Sørvági
Valloyran í Sandavági

**Postadressa:**
Dungasandur 4, Sørvágur

**Telefon:** 590707

**Telefax:** 333550

**T-postur:**
07vestur@07vestur.fo

**Heimasíða:** www.07vestur.fo

**Formaður:**
Jón Nordendal

**Næstformaður**
Jens Kristian Haraldsen

**Skrivari:**
Finnbogi Niclasen

**Peningarøkil:**
Ingibjørn Johannesen

**Nevndarlimir:**
Egil Petersen
Eyðvør Petersen
Ove Heinesen
Rógvi Jacobsen

**Ábyrgd:**
Fróði Poulsen

**Blaðbólkur:**
Fróði Poulsen
Ingolf S. Olsen
Jóanis Albert Nielsen

**Uppseting:** Regin Davidsen

# LEIKARIN HESAFERÐ

Navn: **Predrag Jeremic**

Føddur: **22-11-1987**

Hædd: **180 cm**

Vekt: 72 **kg**

Pláss á vøllinum: **Vinstri vongur ella miðja**

Besti matur: **Pizza**

Heimsins besti fótbóltspælari er: **Leo Messi**

Onnur feløg tú hevur leikt við: **Macva, Napredak, Banat, Ravan Baku, Radnik, Sloboda**

Hvør er tann stuttligi á liðnum: **Teitur Olsen**

Hvør er pressarin á liðnum: **Martin Tausen**

Hvør á liðnum brúkar mest tíð frammanfyri speglinum: **Zoran Vujovic**

Hvør er besti teknikari á liðnum: **Teitur Olsen**

Besti tónleikabólkur: **Lexington**

Besti filmur/seria: **The last dance**





# UPPTAKTIN

*V/ Jarnhold Nattestad*

So er aftur fótbóltur í Betri Deildini hjá monnum á skránni, og sunnudagin kl. 15 møta vit Víkingi, sum liggur á 2. plássi. Við sigri ella minst einum stigi, halda vit fast í 6. plássi.

Mann skal ansa sær hvussu mann umtalar Víking, so mann ikki traðkar nakran gøtu(for) mann á tærnar... men flest øll eru samd um, at Víkingur hevur tikið Betri Deildina á bóli í ár, hóast teir eru nakað væl aftanfyri "klaksvíkingar", sum hava eitt framúr og met-brótandi kappingarár í ár.

Vit í Vágum hava nógv at læra av Víkingi, alt frá føðingini, við sera væleyðnaðu samanleggingini av fótbóltinum í Eystur Kommunu, til stuðulin úr nærumhvørvinum við ómetaliga stóra talinum av sjálvboðnum starvsfólki. Málrættaða barna- og ungdóms-arbeiðið, og so krúnuna á verkinum: lokala og sera sterka besta mansliðið.

Úrslitið av miðvísa arbeiðinum sæst á liðinum, vit skulu møta: Ímillum teir 13 leikararnar hjá Víkingi, sum spæla nærum hvønn dyst, eru heili 6, ið eru 21 ár ella yngri. Hetta vitnar um eitt sera sunt fótbóltsumhvørvið, og um ein venjara, ið torir at geva næsta ættarliði møguleikan. Og eisini - ikki minst - um eitt felag, ið hugsar langsiktað í barna- og ungdómsarbeiðinum og "brúnni" frá ungdómsfótbólti til vaksnamannafóltbólt, og heilt upp til Betri Deildina, umvegis bæði 2. og 1. deild - ikki so nógv reyp og PR, men veruligt, hart arbeiðið.

Men vit eru kanska ikki so langt eftir. Av okkara 13 mest leikandi, eru 8 av okkara egnu, allir uppvaksnir í felagnum og í aldrinum 20-24. Harafturat hava vit givið trimum 18-ára gomlum spælitíð umframt at 22-ára gamli Janus Svabo Samuelsen sær út til at fara at koma fyri seg, við góðum avrikum seinastu dystirnar.

Støðið á liði okkara er helst tað hægsta vit hava sæð her vesturi, bæði til dyst og venjing. Tað vitnar stigatalvan eisini um, nú vit liggja á 6. plássi við 22 stigum eftir 22 dystir. Tað setir eisini krøv til ungdómsarbeiðið, um nakar skal megna at taka stigið allan vegin upp. Vit kunnu gleðast um, at nevnd og venjarar hava sæð hesa avbjóðingina, og rættiliga nógv arbeiðið verður nú lagt í júst hetta. Høvuðsvenjarin, Magnus Powell, saman við hjálparvenjaranum, Tór-Ingar Akselsen, eru nú at síggja á venjingarvøllinum saman við U15- og U17-leikarunum, umframt nýggja og sera dugnaliga høvuðsungdómsvenjaran Matt Potter, saman Jens Erik Rasmussen og fleiri øðrum.

Sunnudagin eru so Víkingar klárir á hinari hálvuni. Vit hava ofta spælt góðar og tættar dystir móti teimum, og vit vænta sjálvandi at kunna taka minst 1 stig hesa ferð. Til tað krevst tó snildi, tí vit hava ofta havt ringt við at fáa stig móti teimum, sum ikki leggja í, um vit hava bóltin. Vit enda í felluni við at leggja okkum langt fram á vøllin, og so fáa hinir málini. Víkingur eru kanska teir bestu í landinum til at fanga mótstøðuliðið í uppspælinum og so at straffa teir við skjótum umstillingum. Tað hava vit uppliva fleiri ferðir.

Sum nevnt í seinastu upptaktini hava vit tó gjørt risa framstig seinastu mánaðarnar, serliga í verjuspælinum, men eisni í framrættaða spæli okkara, ið er blivið betri skipað og við greiðum, tilætlaðum spæli. Um vit megna at samantvinna hesi móti Víkingi, hava vit allar møguleikar.

Koyrið á 07 Vestur!

# VESTMEK
MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA





**Vestmek** bjóðar góða góðsku
fyri góðan prís







VESTMEK
MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA

Bryggjan 17    380 Sørvágur    Faroe Isands    www.vestmek.fo

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

sendistovan

Sand- og skervsølan
í Sandavági

Alt innan:
- tilfar
- veitan
- levering

Finn meg á facebook

Tlf: 213577

Lastvognskoyring v/ Erhard Dam

RISIN
BÓKHALDSVIRKI

TEL. 58 43 89

# KVINNURNAR HAVA STAÐIÐ ROYNDINA

***Fyrsta kappingarárið hjá 07 Vestur-kvinnunum í bestu deildini hevur longu hilnast væl betur enn væntað, nú trý umfør eru eftir at leika, og liðið hevur 12 stig. Venjarin er hugaður at halda fram, og ambisjónirnar fyri næsta ár verða skrúvaðar munandi upp, eins og dreymurin um at gera bart í*** steypakappingini livir

<u>**Ingolf S. Olsen**</u>

Í gjár mistu 07 Vestur-kvinnurnar í Betri Deildini tíverri á stokkinum stutt fyri dystarlok, so B36 kundi fara aftur til Havnar við einum 3-2-sigri og øllum trimum stigunum, men tað broytir ikki upp á flotta avrikið hetta fyrsta kappingarárið, sum 07 Vestur-kvinnurnar hava verið við í bestu deildini.

2021 skuldi í fyrsta lagi verða eitt royndarár, og málið var at enda framman fyri AB/B71, sum eisini er nýtt lið í Betri Deildini – og so kanska megna at vísa eitt sindur av broddi í onkrum av dystunum ímóti øðrum liðum eisini.

Og tann royndin er væl og virðiliga staðin. 07 Vestur hevur vunnið allar dystirnar ímóti AB/B71 og harafturat ein ímóti Víkingi. So 12 stig eru í skjáttuni, nú bara trý umfør eru eftir, og tí ber ikki longur til hjá AB/B71, sum onki stig hevur, at fáa 07 Vestur aftur.

## Væl nøgdur venjari

Venjarin hjá 07 Vestur-kvinnunum, Frankie Jensen, er væl nøgdur.

- Málið var at klára AB/B71, men vit høvdu kanska væntað at vunnið tveir av trimum dystum ímóti teimum og ikki allar tríggjar. Ein annar málsetningur, í hvussu er hjá mær sjálvum, var, at vit kundu skapa okkurt óvæntað úrslit í onkrum av hinum dystunum, og tað málið er eisini rokkið. Vit vunnu jú á Víkingi heima í august, og fyri okkum var tað ein stórur sigur, sigur hann.

Hóast tað ikki sæst aftur á stigatalvuni, so hava 07 Vestur-kvinnurnar eisini víst veruliga styrki í øðrum dystum. Tær taptu tepurt 2-1 ímóti toppliðnum EB-Streymi/Skála á Skála í øðrum umfari, og



*07 Vestur-kvinnurnar í Betri Deildini hava vunnið allar dystirnar ímóti AB/B71, ein ímóti Víkingi og annars spælt fleiri javnar dystir, sum tó eru taptir, ímóti toppliðum. So tær kvinnurnar hava væl og virðiliga staðið royndina*

tá liðini aftur møttust við Margáir 4. september, tapti 07 Vestur 1-0 upp á eitt brotsspark.

## B36 fekk skarpan gang

Í gjár var so um reppið, at 07 Vestur megnaði javnleik ímóti B36, sum eisini hevur fingið skarpan gang í báðum teimum undanfarnu dystunum.

Í apríl spældu liðini ein javnan dyst á Dungasandi, har 07 Vesturkvinnurnar máttu iðra seg um kortini at tapa 2-0. Tá liðini so møttust í Gundadali í juni, vóru vágakvinnurnar altráar eftir at fáa stig. Men til alla ólukku fingu tær eitt reytt kort og eitt brotsspark dømt ímót sær longu eftir fýra minuttum. B36 skoraði upp á brotssparkið, men hóast mótbrekkuna hjá 07 Vestur-kvinnunum, so megnaðu tær at javna og høvdu eisini tveir heilt stórar málmøguleikar afturat í fyrra hálvleiki, meðan heimaliðið lítið og onki hevði at bjóða upp á.

Eitt rættvísandi hálvleiksúrslit í tí dystinum hevði tí verið 3-1 til 07 Vestur, sjálvt um tær vóru ein spælari færri. Tað vóru tey flestu samd um.

(framhald á síðu 18)




BANKNORDIK

**Heili 85% av føroyingum hava ikki nóg gott innlit í sína pensjón og sínar lívstryggingar. Ert tú ein av hesum?**

Kanna tína støðu á **banknordik.fo/pensjon**

*Ráðgeving, sum øll skilja*

EM Asfalt

Tel. 22 51 10 & 22 47 16

jn.fo

# VIÐLÌKAHALDSFRÌTT











## PLASTKLÆDNING OG BJÀLVING

Vit umboða dygdar húsaklæðningin úr plast.
Týski klæðningurin er sera væl egnaður til føroyska veðurlagið.

10 ymiskir litir eru at velja í,
og horn og listar fáast í somu litum.

Brettini eru heili 6 metur til longdar.

**SANDAVÁGS TIMBURHANDIL**

Hillingatangi - 360 Sandavágur - Tlf. 332700 - www.timbur.fo

# Bilasølan

STUÐLAR

07 VESTUR

ŠKODA



**Flott snið og týsk góðska, tá hon er allarbest.**


Sørvágs kommuna
stuðlar 07 Vestur
Varðagøta 8 • FO-380 Sørvágur • www.sorvag.fo


Vága kommuna
stuðlar 07 Vestur
www.vaga.fo
VÁGA KOMMUNA

| Nr. | Leikari | Aldur | Dystir | Mál | Minutir |
|---|---|---|---|---|---|
| 1. | Silas Eyðsteinsson | 23 | 22 | - | 1980 |
| 9. | Martin Heiberg Petterson | 24 | 22 | 3 | 1937 |
| 23. | Jóannis á Steig | 24 | 21 | 1 | 1864 |
| 22. | Predrag Jeremic | 33 | 20 | 3 | 1553 |
| 4. | Dann Fróðason | 21 | 19 | 1 | 1648 |
| 21. | Teitur Olsen | 23 | 19 | 1 | 1441 |
| 8. | Martin Tausen | 31 | 18 | 2 | 1288 |
| 70. | Albert Theis Nielsen | 21 | 18 | 1 | 671 |
| 3. | Dánjal Pauli Lervig | 30 | 16 | - | 1259 |
| 14. | Ragnar Weihe | 20 | 15 | 1 | 713 |
| 7. | Høgni E. Nielsen | 24 | 14 | 2 | 966 |
| 24. | Sølvi Egilsson | 26 | 14 | 1 | 578 |
| 15. | Asbjørn Heðinsson | 20 | 11 | - | 888 |
| 6. | Kevin Jablinski | 25 | 10 | 1 | 900 |
| 11. | Zoran Vojovic | 35 | 10 | 1 | 664 |
| 2. | Eiler Fróðason | 18 | 9 | 2 | 564 |
| 20. | John Fagerström | 23 | 8 | 2 | 713 |
| 10. | Erling F. Myklebust | 24 | 8 | 1 | 616 |
| 10. | Marius Hagen | 29 | 6 | - | 522 |
| 5. | Heine Mortensen | 30 | 6 | 1 | 409 |
| 19. | Janus Samuelsen | 22 | 6 | - | 183 |
| 6. | Tór-Ingar Akselsen | 40 | 4 | 1 | 323 |
| 12. | Marjus E. Nielsen | 18 | 3 | - | 33 |
| 17. | Ingi Joensen | 18 | 2 | - | 9 |
| 16. | Ari í H. Petersen | 18 | - | - | 0 |
| 18. | Brandur Heinesen | 19 | - | - | 0 |
| | Sámuel Eyðsteinsson | 20 | - | - | 0 |
| | Venjari: Magnus Powell | | | | |

| Leikari |
|---|
| Gunnar Vatnhamar |
| Géza Dávid Turi |
| Andreas Olsen |
| Olaf Bárðarson |
| Jákup Johansen |
| Noah Mneney |
| Bárður á Reynatrøð |
| Bergur Gregersen |
| Atli Gregersen |
| Martin Klein |
| Sølvi Vatnhamar |
| Arnbjørn Svensson |
| Ingi Jonhardsson |
| Bárður Hansen |
| Ari Olsen |
| Signar á Brúnni |
| Finnur Justinussen |
| Aron Ellingsgaard |
| Sonni Højgaard |
| Jákup Andrias Thomsen |
| Óla Kristian Jacobsen |
| Bergur Poulsen |
| Hans Jákup Arngrímsson |
| Sveinur Justinussen |
| Venjari: Jóhan Petur Poulsen |

unicar.fo

BILÚTLEIGAN, OG EISINI UMVÆLA VIT SKAÐAR,
LAKKERA OG SKIFTA RÚTAR + 298 544000

# STIGATALVAN

| # | Lið: | D | V | J | T | MF | MÍ | MM | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 22 | 20 | 2 | 0 | 87 | 6 | 81 | 62 |
| 2 | Víkingur | 22 | 15 | 5 | 5 | 50 | 20 | 30 | 50 |
| 3 | HB | 21 | 13 | 4 | 4 | 63 | 18 | 45 | 43 |
| 4 | B36 | 22 | 10 | 9 | 3 | 43 | 22 | 21 | 39 |
| 5 | NSÍ | 23 | 10 | 5 | 8 | 44 | 36 | 8 | 35 |
| 6 | 07 Vestur | 22 | 6 | 4 | 12 | 28 | 63 | -35 | 22 |
| 7 | EB/Streymur | 21 | 5 | 4 | 12 | 18 | 42 | -24 | 19 |
| 8 | B68 | 22 | 5 | 4 | 13 | 25 | 57 | -32 | 19 |
| 9 | ÍF | 22 | 3 | 4 | 15 | 20 | 55 | -35 | 13 |
| 10 | TB | 21 | 0 | 3 | 18 | 12 | 71 | -59 | 3 |



CARRO
carro.fo - 21 25 51

FAE VÁGA FLOGHAVN

Giljanes bussar koyra um alt landið




Tel. 21 98 99 giljanes@giljanes.fo

.fo
Vágaportalurin

Vágafólk lesa
Vágaportalin

.fo
Vágaportalurin







FOSSÁ

FROZEN FISH
LANDING

Hølcksmíð
v/Gerhard Hansen

Alt innan
timburarbeiði

Tlf. 282710



Neinbjørn Nattestad
Bilverkstaður
Tlf. 332727 | Fax. 333727

MÚRARIN

V/ Kell E. Jensen
Kálvalíðvegur 10
370 Miðvág
tlf. 332779 og 222101
t-post: murarin@olivant.fo


BETONG RUNT ALT LANDIÐ
58 50 25 ella 31 50 60
Vit veita eisini vegleiðing í sambandi við betongsløg og styrki
Blandistøðin er góðkend av Norska Kontrollrådet
J&K BETONG
J&K
BETONG
31 50 60


Sp/f Mykines
Bryggjan 17
FO-380 Sørvágur
Tel. +298 21 08 70
www.mykines.fo
mykines.fo
must see from sea

*(framhald av síðu 7)*

Men tíverri bleiv tað ikki so, og í seinna hálvleiki gekk megin undan, so tað í staðin endaði við einum 3-1-sigri til B36.

- Men vit hava í hvussu er givið B36 skarpan gang í øllum dystunum og víst, at vit eisini kunnu spæla upp ímóti teimum bestu, sigur Frankie Jensen.

## Størri ambisjónir

Frankie Jensen hevur bara gjørt sáttmála við 07 Vestur fyri hetta kappingarárið, men hann dylir ikki, at hann hevur hug at halda fram sum høvuðsvenjari hjá kvinnunum. Partarnir eru eisini longu farnir at tosa um, hvørjar ætlanir og ambisjónir eru fyri næsta kappingarárið, og hósdagin verður leikarafundur, har hetta eisini verður á skrá.

- Eg stórtrívist her vesturi og vil fegin halda fram, sigur hann. Ambisjónirnar fyri næsta ár eru eisini munandi størri enn fyri ár.

- Vit ætla í hvussu er ikki at vera eitt lið, sum øll hini hølva av, og okkara ambisjón er at fanga nøkur av liðunum, sum eru framman fyri okkum nú, so vit kunnu vera við til at spæla um eitt triðjapláss, sigur Frankie Jensen.

## Noyddust burtur

2021 skuldi sum nevnt vera eitt royndarár, men yvirskipaða málið hjá 07 Vestur er at kunna kjølfesta eitt lið í bestu kvinnudeildini. Sjálvandi fyri at røkka best møgulig úrslit, men eisini fyri at geva lokalu spælarunum møguleika at spæla á hægsta stigi í felagnum og halda upp á teir.

Tí talentini tróta ikki, men fyrr hava kvinnurnar noyðst aðrastaðni at spæla, um tær vildu spæla á hægsta stigi.

- Støðan var tann, at felagið misti allar teir ungu, kvinnuligu spælararnar til onnur feløg. Fleiri vóru farnar, og nú nakrar ungar vóru á veg upp, var tað helst bara ein spurningur um tíð, áðrenn tær eisini fóru. Tí høvdu tey ein leikarafund – tað var áðrenn, eg varð kontraktaður – har tað bleiv spurt, um tey vildu royna hetta at tekna seg til Betri Deildina. Svarið var, at tað vildu tey ikki bara við tí hópinum, sum tá vark so neyðugt var at fáa leita sær styrk uttaneftir, greiðir Frankie Jensen frá.

## Brasilskir spælarar

Fyrst var lýst og leitað í Íslandi, men uttan úrslit. Síðan fóru Frankie Jensen og Jens Erik Rasmussen, ungdómsvenjari, sum er kendur í Brasil, at tosa um at hyggja tann vegin. Tá bar til, og hetta kappingarárið hava so tríggjar brasilskar kvinnur verið fastir spælarar í hópinum.

Tær hava trivist væl og hava verið góðar fyri liðið, sigur Frankie Jensen. Brasilsku kvinnurnar hava arbeitt




*- Eg stórtrívist her vesturi og vil fegin halda fram, sigur Frankie Jensen, sum hevur munandi størri ambisjónir fyri næsta kappingarárið hjá 07 Vestur-kvinnunum*

hjá Hiddenfjord, har tær eisini hava trivist væl og eru sera væl lýddar, sigur hann.

Tað er eisini ætlanin at hava tríggjar brasilskar spælarar á kvinnuliðnum næsta ár, tó at tað ikki er vist, at tað verða tær somu sum nú.
- Tað er neyðugt fyri at hava eitt stabilt lið, í hvussu er í eina tíð, greiðir venjarin frá.

## Gávuríkir spælarar

Men lokali bulurin mennist í hvørjum. Fýra ungar kvinnur eru sostatt á veg upp. Kristina Gásdal og Eyrið Rúnadóttir eru báðar á U19-landsliðnum, og Bára Jansdóttir og Lisa Haraldsen eru á U17-landsliðnum. Tær tríggjar fyrst nevndu eru longu á besta liðnum, og Lisa Haraldsen fær aldur at spæla har 30. september.

Og tað var júst tað, sum var eitt høvuðsendamál við at tekna seg til Betri Deildina – at geva teimum ungu, gávuríku spælarunum møguleika at mennast í sínum egna felag og tann vegin sleppa at kappast á hægsta stigi.

## Steypavónir

Hóast tað longu verður hugsað nógv um næsta kappingarár, og hvussu farast skal fram tá, so er spenningurin als ikki av enn í hesum kappingarárinum.

07 Vestur hevur nevniliga spælt seg í hálvfinalurnar í steypakappingini, og Frankie Jensen dylir ikki, at hann eisini hevur ein dreym um at skapa óvæntað úrslit har.

- Tá lutakastið var, kundu vit trekkja HB, NSÍ ella B36, og tað er helst ongin loyna, at vit vónaðu at trekkja B36. Men vit trektu HB, sum, rætt skal vera rætt, hevur bukað okkum av allar tríggjar dystirnar, vit hava spælt ímóti teimum. Men nú hava vit hetta eftir at berjast um, og vit ætla absolutt at royna at koma í finaluna, sjálvt um tað sjálvandi verður ógvuliga torført, sigur hann.

Fyrri hálvfinaludysturin verður spældur á Dungasandi 6. oktober og tann seinni í Gundadali 30. oktober.
--





# 2. DEILD MENN FLYTA UPP Í 1. DEILD

# HJARTALIGA TIL LUKKU



Dalsbø Sp/f tlf. 228991





www.wt.fo



VESTPACK

VESTPACK

VESTPACK

Handilsvirkið Niclasen

Timburhandil og byggibúð




Handilsvirkið Niclasen - Bakkavegur 26
Teldupostur: niclasen@niclasen.fo
TLF: 33 20 01 - FAX: 33 20 50

SMIÐJAN
TEL. 30 88 88

Klima

MTHøjgaard

Movement that inspires

# Bílegg títt kort her

betri.fo/fjepparakort



# DYSTARSKRÁ 2021 BETRIDEILDIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | 07-03-2021 | 07 Vestur - B36 | 0-2 |
| 2. | 13-03-2021 | 07 Vestur - B68 | 3-2 |
| 3. | 20-03-2021 | ÍF - 07 Vestur | 3-1 |
| 4 | 28-04-2021 | 07 Vestur - EB/Streymur | 1-3 |
| 5. | 11-04-2021 | HB - 07 Vestur | 7-0 |
| 6. | 14-04-2021 | TB - 07 Vestur | 2-4 |
| 7. | 25-04-2021 | 07 Vestur - Víkingur | 2-4 |
| 8. | 02-05-2021 | 07 Vestur - KÍ | 0-5 |
| 9 | 08-05-2021 | NSÍ - 07 Vestur | 1-1 |
| 10. | 13-05-2021 | 07 Vestur - KÍ | 0-9 |
| 11. | 16-05-2021 | B36 - 07 Vestur | 1-1 |
| 12. | 02-10-2021 | B68 - 07 Vestur | |
| 13. | 15-06-2021 | 07 Vestur - ÍF | 1-0 |
| 14. | 20-06-2021 | Víkingur - 07 Vestur | 4-1 |
| 15. | 26-06-2021 | 07 Vestur - NSÍ | 2-4 |
| 16. | 27-07-2021 | 07 Vestur - EB/Streymur | 0-1 |
| 17. | 02-08-2021 | HB - 07 Vestur | 5-0 |
| 18. | 08-08-2021 | 07 Vestur - TB | 3-1 |
| 19. | 15-08-2021 | EB/Streymur - 07 Vestur | 1-3 |
| 20. | 22-08-2021 | ÍF - 07 Vestur | 1-2 |
| 21. | 28-08-2021 | 07 Vestur - B68 | 1-1 |
| 22. | 12-09-2021 | 07 Vestur - B36 | 2-2 |
| 23. | 19-09-2021 | KÍ - 07 Vestur | 4-0 |
| 24. | 26-09-2021 | 07 Vestur - Víkingur | |
| 25. | 17-10-2021 | NSÍ - 07 Vestur | |
| 26. | 24-10-2021 | 07 Vestur - HB | |
| 27. | 30-10-2021 | TB - 07 Vestur | |

# Familjubufffét

**Mán-Hós: Kl. 16.30 – 20.00**
**Fríggjadag: Kl. 16.30 – 21.00**
**Leygardag og Sunnudag: Kl. 13.00 – 21.00**



## Et, alt tú orkar, fyri 139,-
**(12 ár og eldri | Íroknað ísbuffét, sodavatn og kaffi/te)**

## Og títt barn etur fyri einans 70,-
**(11 ár og yngri, saman við foreldrum. Íroknað ísbuffét og sodavatn)**

## Bólkar (min. 10 fólk) 100,-
**(11 ár og yngri, saman við minst einum gjaldandi vaksnum. Íroknað ísbuffét og sodavatn)**

**Lat okkum ordna innkeypið og uppvaskið**

PIZZA 67

**www.pizza67.fo – Tel 356767**

Vit hava 3 sløg av pizza, salat, 4 sløg av dressingi, nachos, nýbakað hvítleyks-breyð, høsnagrýtu, nuggets, buffalo høsnaveingir, várrullur, chips, rís og 5 sløg av sodavatni, og omaná fáa tit 7 sløg av ísi og kaffi.


SANSIR
Heildar-
loysnir
frá
ArtiCon
HOTEL BRANDAN
ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo


Betong og timburarbeiði
Jóni Durhuus, byggimeistari • FO-350 Vestmanna • Tlf. 424473 - 223124

SPORT 24

KEYP EISINI OKKARA VØRUR
Á FØROYA FEITASTA NETHANDLI

**WWW.SKALKUR.FO**

ÓKEYPIS TIL DYRNAR
Í ØLLUM FØROYUM.

| SMS 31 95 12 | SALTANGARÁ 45 95 12 |


SPEKT
løggildir
grannskoðarar
Staravegur 17
Postsmoga 3258
110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo
Heildarloysn til kappingarføran prís
lætt og ómakaleyst
XBRL, skatt, bókhald, MVG, roknskap og annað
Ring ella les meira um okkara heildarloysnir á www.spekt.fo


Frá stórum til smærri
MASKINGREVSTUR
- PLANERING
- ÚTGREVSTUR
- BREKKING
Tilboð verða latin
Vit hava maskinur til hvørja einstøku uppgávu
Maskingrevstur v/Allan H. Hansen · 370 Miðvágur · tel 22 22 41


BÓNUS
STUÐLAR ÍTRÓTTINUM Í NÆRUMHVØRVINUM
mánadag til leygardag | 9-22


Föroya Bjór
NÚ Í DÓS
Jolly ORANGE
Jolly ORANGE
FÆST KRING LANDIÐ

HIDDEN**FJORD**

RAISED IN THE WILD

# Fyrsti alari í heiminum at gevast við flogflutningi

At flúgva vøru elvir til óneyðugt CO2-útlát.
Ov nógv CO2-útlát elvir til veðurlagsbroytingar.



Við at skifta til sjóflutning er CO2-útlátið fyri flutning til USA minkað við heili **94%**